# Føroyskur limaskapur stríðir ímóti grundlógini

**Mikudagin var fundur í Norðurlandaráðnum, og har kom fram at løgfrøðiligar forðingar eru fyri, at Føroyar kunnu fáa fullan limaskap.**
**- Inntil nú hava vit fingið at vita, at ongar løgfrøðiligar forðingar eru, sigur Kári P. Højgaard, ið er annað av føroysku umboðunum í Norðurlandaráðnum**

POLITIKKUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Í 2003 samtykti løgtingið at Føroyar skuldu søkja um fullan limaskap í Norðurlandaráðnum og Ráðharraráðnum.

Í hesum sambandi helt formansskapurin í Norðurlandaráðnum ein fund í Føroyum í summar, har greitt var frá um nakrar forðingar vóru fyri hesum limaskapi.

Millum onnur luttók Frederik Harhoff, ríkisrættarserfrøðingur, á fundinum.

- Allir limirnir í formansskapinum skiltu tað soleiðis, at hann samanumtikið ikki helt, at nakrar lógarligar ella fólkarættarligar forðingar vóru fyri, at føroyingar kunnu fáa sjálvstøðugan limaskap. Og at tær forðingar sum vóru, til dømis í Helsingforssáttmálnum, kundu allar loysast politiskt, greiðir Kári P. Højgaard frá.

Men 20. september var fundur í Norðurlandaráðnum í Lahtis í Finnlandi. Kári P. Højgaard og Jógvan við Keldu, ið umboða løgtingið í Norðurlandaráðnum vóru við á fundinum.

- Frederik Harhoff er komin við eini nýggjari útgreining, har hann ger greitt, at tað eru trupulleikar við føroysku umsóknini, tí føroyskur limaskapur hevði verið í stríð við grein 19 í donsku grundlógini, sigur Kári P. Højgaard.

- Vit hava øll livað í teirri trúgv, at ongar rættarligar forðingar hava verið fyri føroyskum limaskapi í Norðurlandaráðnum. Men nýggja útgreiningin hjá Frederik Harhoff vísir at hetta ikki er so.

Nú hevur formansskapurin í Norðurlandaráðnum skrivað til stjórnirnar í Danmark, Føroyum og Grønlandi og biðið um eina útgreining um nýggju upplýsingarnar. Henda útgreining skal vera klár til næsta fund í Norðurlandaráðnum, sum verður um mánaðarskiftið oktober – november, har orðaskiftið skal vera um evnið.

- Vit væntaðu at fáa eina endaliga avgerð um føroyskan limaskap á komandi fundi, men nú verður endaliga viðgerðin útsett til komandi summar, sigur Kári P. Højgaard.



*- Frederik Harhoff er komin við eini nýggjari útgreining, har hann ger greitt, at fullur limaskapur til Føroyar í Norðurlandráðnum hevði verið í stríð við grein 19 í donsku grundlógini, sigur Kári P. Højgaard*

**Fleiri viðmerkingar til málið verða í Sosialinum mánadagin.**

# Kann sameinast við grundlógina

**- Eg haldi ikki at føroyskur limaskapur í Norðurlandaráðnum er í stríð við grundlógina, sigur Halgir W. Poulsen løgfrøðingur**

POLITIKKUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Halgir W. Poulsen hevur ráðgivið løgtinginum í sambandi við umsóknina um at gerast limur í Norðurlandaráðnum.

Tá skrivaði hann m.a.:

»Samanumtikið má niðurstøðan vera tann, at tað hvørki í altjóða rætti ella danskari lóggávu, eru nakrar forðingar fyri, at Føroyar gerast fullur limur í Norðurlandaráðnum og Norðurlandaráðharraráðnum. Tað avgerandi er, um politiskur vilji er til staðar hjá donsku stjórnini og hinum norðurlendsku stjórnunum til at gera tær neyðugu broytingarnar í Helsingforssáttmálanum sum fortreyt fyri tílíkum limaskapi, og hvør í sínum lagi tær innlendsku lógarbroytingarnar, sum møguliga gerast neyðugar.«

Halgir W. Poulsen heldur fast við hesa niðurstøðu.

- Grundlógin verður ofta tulkað út frá hvønn politikk stjórnin ynskir at føra. Um tey høvdu ynskt, at Føroyar skuldu kunna luttakið í Norðurlandaráðnum, so ber tað til út frá grundlógini, sigur Halgir W. Poulsen.

- Eg dugi ikki at síggja, at tað nýtist at stríða ímóti grundlógini. Grundlógin er 150 ára gomul, og hon verður tulkað ógvuliga leysliga. Grein 19, sum Harhoff sigur forðar fyri føroyskum limaskapi í Norðurlandaráðnum, sigur at»Kongen handler på rigets vegne i mellemfolkelige anliggender.« Og tað er jú ikki kongurin, sum umboðar Danmark.

- Eg haldi tí ikki at føroyskur limaskapur í Norðurlandaráðnum er í stríð við grundlógina.



*- Grundlógin verður ofta tulkað út frá hvønn politikk stjórnin ynskir at føra. Um tey høvdu ynskt, at Føroyar skuldu kunna luttakið í Norðurlandaráðnum, so ber tað til út frá grundlógini, sigur Halgir W. Poulsen.*

## Grundlógin

**§ 19**
**Stk. 1.**
Kongen handler på rigets vegne i mellemfolkelige anliggender. Uden folketingets samtykke kan han dog ikke foretage nogen handling, der forøger eller indskrænker rigets område, eller indgå nogen forpligtigelse, til hvis opfyldelse folketingets medvirken er nødvendig, eller som iøvrigt er af større betydning. Ejheller kan kongen uden folketingets samtykke opsige nogen mellemfolkelig overenskomst, som er indgået med folketingets samtykke.

**Eydnuhjól**

Verður í Losjuni í Gøtu leygarkvøldið 23. september 2006 kl. 19.00.

GÍ Gøtu Ítróttarfelag



**Motorsúkkla til sølu**

Motorsúkkla til sølu fyri kr. 73.000,-. 4 mðr. gomul

**Tlf 50 55 50**